# Rimmar rokk-konsert í losjuni í Gøtu

**Nýumvælda Losjan í Gøtu fær sín elddóp leygarkvøldið, tá bólkar úr Eysturoy og Havn hittast til rimmar rokk-konsert**



*Braquet verður millum bólkarnar, sum leygarkvøldið fara á pallin í nýumvældu Losjuni í Gøtu*

Braquet, Lív Hansen, Synarchy og The Story Ends spæla konsert í Losjuni í Gøtu nú leygarkvøldið 4. Juni kl 21.00

Braquet eru fløguaktuellir í løtuni og høvdu m. a. eina sera góða framførslu til framsýniskonsertina fyri útlendsku Prix-tónleikagestunum í Fuglafirði, og fingu í tí sambandinum góða umrøðu bæði í Íslandi og Danmørk. Sterkasti trumfurin hjá Braquet er óiva guitarleikarin Arni Zachariassen, ið spælir beinini undan hvørjum sum helst.

Lív Hansen er eitt spildurnýtt navn í føroyskum tónleikahøpi. Hon kom við sjógv á bak inn á 15 tær bestu við lagnum Eitt Annað Land, sum í løtuni liggur nr. 5. Lív hevur eina heilt serliga góða rødd, sum kann taka hana langt innan tónleikin.

Synarchy og The Story Ends eru báðir bólkar úr Margarinumhvørvinum í Havn. Synarchy hoyrdu vit í prixnum og vunnu teir uttan iva mangan peppaðan fjeppara har við orkufullari framførslu av sínum thrashuta tónleiki. The Story Ends er bleytari og sorgblíðari í tí, kanska meira í stíl við Gestir, Radiohead og tílíkt.

- Komið framvið leygarkvøldið og hoyrið góðu bólkarnar og síggj hvussu flott Losjan, kanska mest týðandi spælistaðið í landinum seinastu 10 árini, er blivin, sigur Tónleikasamtakið Grót í tíðindaskrivi.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av landsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av eystri. Yvirhøvur turt og sólglottar, men seint um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri, seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind. Regn av og á og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og regn av og á. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, sunnudagin lot av ymsum ættum. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 5 og 9 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 16 |
| Tromsø | 5 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 14 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 31 |
| Kiev | 28 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 23 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 23 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 17 |
| New York | 23 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 31 |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1030 hPa. við Føroyar fer spakuliga eystureftir og viknar. Eitt lágtrýst, 1002 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing eystan.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Skotland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður skamt sunnan fyri Føroyar við avfalli.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/5 kl. 06[00]– 31/5. 06[00]. Hitin í gjár: 5,1°
Minsti hiti máldur í mai: -3,0° - Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 30/5 kl. 06[00]– 31/5 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mai: 62,4 mm






## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 26. mai | Mánin næstur jørðini |
| 30. mai | Seinna kvarter |
| 6. juni | Tendring |
| 11. juni | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. juni | 03.16 | 15.38 | 02.16 | 14.38 | 02.31 | 14.53 | 05.16 | 17.38 | 06.16 | 18.38 | 01.31 | 13.53 | 00.31 | 12.53 | 03.31 | 15.53 | 04.31 | 16.53 | 03.01 | 15.23 | 04.16 | 16.38 |
| 2. Juni | 03.59 | 16.21 | 02.59 | 15.21 | 03.14 | 15.36 | 05.59 | 18.21 | 06.59 | 19.21 | 02.14 | 14.36 | 01.14 | 13.36 | 04.14 | 16.36 | 05.14 | 17.36 | 03.44 | 16.06 | 04.59 | 17.21 |
| 3. Juni | 04.43 | 17.05 | 03.43 | 16.05 | 03.58 | 16.20 | 06.43 | 19.05 | 07.43 | 20.05 | 02.58 | 15.20 | 01.58 | 14.20 | 04.58 | 17.20 | 05.58 | 18.20 | 04.28 | 16.50 | 05.43 | 18.05 |
| 4. Juni | 05.26 | 17.48 | 04.26 | 16.48 | 04.41 | 17.03 | 07.26 | 19.48 | 08.26 | 20.48 | 03.41 | 16.03 | 02.41 | 15.03 | 05.41 | 18.03 | 06.41 | 19.03 | 05.11 | 17.33 | 06.26 | 18.48 |
| 5. Juni | 06.11 | 18.34 | 05.11 | 17.34 | 05.26 | 17.49 | 08.11 | 20.34 | 09.11 | 21.34 | 04.26 | 16.49 | 03.26 | 15.49 | 06.26 | 18.49 | 07.26 | 19.49 | 05.56 | 18.19 | 07.11 | 19.34 |

5 707265 100036 >